Føroya Banki

# Almennar tryggingartreytir fyri Samlagstrygging

Í gildi 23.12.1992


§ 1. Innliman. .......... 2
§ 2. Útgjald við deyða. .......... 2
§ 3 A. Útgjald við avlamni. .......... 2
§ 3 B. Lokaupphædd. .......... 3
§ 5. Trygging, ið eisini umfatar hjúnafelaga. .......... 3
§ 6. Trygging av sambúgva, javnbjóðis við hjúnafelaga. .......... 3
§ 7. Avgjalds- og skattaviðurskifti. .......... 4
§ 8. Váði, ið er undantikin tryggingarveiting. .......... 4
§ 9. Tryggingargjald. .......... 4
§ 11. Bonus. .......... 4
§ 12. Gjaldsundantøka. .......... 4
§ 13. Framhaldstrygging. .......... 5
§ 14. Fyrning. .......... 5
§ 15. Limur sigur seg úr bólkinum. .......... 5
§ 16. Uppsøgn. .......... 5

## Tryggingartreytir fyri Samlagstrygging

Samlagstrygging er ein avtala, ið verður gjørd millum lívstryggingarstovnin, LÍV og tryggingartakaran, ið kann vera arbeiðsgevari, yrkisfelag el.a.

Samlagstrygging tryggjar ávísan hóp og umfatar starvsfólk, limir í felagi/yrkisfelagi, viðskiftafólk í peningastovni og aðrar bólkar, øll undir einum nevnd limir.

Tá ásetingar eru um hjúnalag ella hjúnafelaga í avtalu um Samlagstrygging og í treytunum, er tað sama galdandi fyri sambúgva.

### § 1. Innliman.

Innliman í Samlagstrygging er treytað av, at LÍV fær allar váðaupplýsingar, ið verða umbidnar, herundir heilsuupplýsingar.

Tryggingin tekur við frá tí degi, LÍV teknar hana, uttan so at frammanundan er gjørd onnur avtala, ið ásetur, nær tryggingin skal setast í gildi.

Verður Samlagstryggingin broytt, eru somu reglur galdandi, sum tá tryggingin upprunaliga varð teknað.

Gevur tryggingartakarin skeivar ella ófullkomnar upplýsingar, tá tryggingin verður teknað ella seinni, eru rættaravleiðingarnar tær somu sum í Tryggingaravtalulógini §§ 4-10.

### § 2. Útgjald við deyða.

Tryggingarveiting, ið fellur til útgjaldingar um limur doyr, verður útgoldin næstu avvarðandi, uttan so at annað skrivliga er avtalað millum limin og LÍV.

Næstu avvarðandi eru fyrst hjúnafelagin, tínæst børn og síðani arvingar sambært arvalógini ella testamenti.

Umfatar Samlagstryggingin barnaupphæddir, verða tær útgoldnar sum ásett í avtaluni um Samlagstrygging. Børn eru í hesum sambandi eisini stjúkbørn og serbørn í hjúnalagi ella børn hjá sambúgvandi, samanberið § 6.

LÍV skal hava neyðug skjalprógv, aðrenn útgoldið verður .

### § 3 A. Útgjald við avlamni.

Umfatar avtalan um Samlagstrygging eisini avlamisupphædd, verður hon útgoldin, tá arbeiðsførið hjá liminum er varandi niðursett.

Veitingin kann latast, um tryggjaði orsakað av sjúku ella vanlukku verður avlamin, og um hetta hendir eftir, at Samlagstryggingaravtalan er dagfest, men áðrenn limurin hevur fylt 67 ár.

Hesin niðurskurður í arbeiðsførinum er staðfestur, tá limur av omanfyri nevndu orsøk hevur fingið tillutað avlamisveiting frá tí almenna. Arbeiðsførið skal vera niðursett við 2/3 og limur má ikki hava fylt 67 ár.

Limurin fær avlamisupphæddina útgoldna, men LÍV skal hava neyðug skjalprógv, aðrenn útgoldið verður.

Tá ið avlamisupphæddin er útgoldin, veitir tryggingin ikki longur endurgjald við avlamni.

§ 3 B. Lokaupphædd.

Umfatar Samlagstryggingin eina tryggingarupphædd - lokaupphædd - ið fellur til útgjaldingar við eftirlønaraldur, verður útgoldið samsvarandi ásetingunum í sáttmála partanna millum.

Ein lokaupphædd við eftirlønaraldur kann í fyrsta lagi verða útgoldin við 60 ára aldur, men áðrenn limur hevur fylt 70 ár.

Upphæddin verður goldin liminum, tá ið LÍV hevur fingið neyðug skjalprógv.

§ 4. Avlamisrenta.

Fevnir Samlagstryggingin um avlamisrentu, tekur hon við, tá arbeiðsføri hjá liminum er varandi niðursett við 2/3, orsakað av sjúku ella vanlukku. Avtalan tekur við, tá sáttmálin er dagfestur og stendur við til ta í avtaluni ásettu tíðina, tó ikki longur enn til limurin fyllir 67 ár.

Óarbeiðsførið er staðfest, tá LÍV metir, at limur ikki longur - mett í mun til núverandi heilsu hjá tí tryggjaða, útbúgving og fyrrverandi størv - kann forvinna meira enn 1/3 av tí, ið heilt arbeiðsførir persónar annars við somu útbúgving og í sama aldri kunnu forvinna.

Avlamisrenta verður latin frá tí degi, limur uttan íhald hevur verið óarbeiðsførur í 3 mánaðir. Avlamisrenta verður goldin frammanundan hvønn mánað.

Avlamisrentan kann útgjaldast, tá LÍV hevur fingið tey skjalprógv, ið neyðug eru. Goldið verður til tann, ið sambært Samlagstryggingaravtaluni hevur rætt til veitingina.

Tá avlamisrenta er útgoldin í eitt ár, kann LÍV treyta sær, at framhaldandi veiting einans verður útgoldin, um limurin hevur rætt til almenna veiting, sum svarar til, at arbeiðsførið er skert við 2/3 ella meira.

Verður limurin arbeiðsførur aftur, og fyritreytirnar fyri at fáa avlamisrentu ikki eru til staðar longur, steðgar útgjaldingin. Somuleiðis steðgar veitingin, tá limurin røkkur tann aldur, tá ið Samlagstryggingin sambært innihaldi sínum natúrliga heldur uppat.

§ 5. Trygging, ið eisini umfatar hjúnafelaga.

Fevnir Samlagstryggingin eisini um hjúnafelagan, verður tann tryggingarveiting, ið fellur til útgjaldingar, um hjúnafelagin doyr, útgoldin til limin. Doyr limur, verður utgoldið til "næstu avvðandi", sí § 2, stk. 1 og 2.

Tryggingin hjá hjúnafelagnum fer úr gildi við separatión/sundurskilnað ella samstundis sum limur sjálvur fer úr Samlagstrygging.

Doyr limur, heldur hjúnafelagatrygging tó fram í 30 dagar eftir deyða.

§ 6. Trygging av sambúgva, javnbjóðis við hjúnafelaga.

Umfatar Samlagstrygging eisini trygging av hjúnafelaga hjá honum/henni, ið er felagslívstryggjað/ur, og/ella rætt til barnaveiting, verður búfelagsskapur javnsettur við hjúnalag, um niðanfyri nevndu treytir eru loknar:

- at parið hevur búð saman á felags bústaði uttan íhald tvey tey seinastu árini, áðrenn tryggingin gerst virkin (aktuel).
- at parið, seinastu tvey árini áðrenn tryggingin gerst virkin, í tvey ár uttan íhald hevur livað saman sum í hjúnalagi, uttan at nakað sambært lógini hevur verið til hindurs fyri hjúnabandi.

Tryggingarupphæddin, ið fellur til gjaldingar, um sambúgvin doyr, verður útgoldin liminum, ið er felagslívstryggjaður.

Doyr limur, verður útgoldið til hansara/hennara "næstu avvarðandi", sí § 2, stk. 1. og 2.

Um limur doyr, heldur tryggingin hjá sambúgva tó fram í 30 dagar eftir deyða. Barnaveitingar verða útgoldnar sum ásett í Samlagstryggingaravtaluni.

## § 7. Avgjalds- og skattaviðurskifti.

Skattir og avgjøld, ið LÍV sambært galdandi lóg hevur skyldu at gjalda myndugleikunum, verða drigin frá, áðrenn veitingin verður útgoldin.

## § 8. Váði, ið er undantikin tryggingarveiting.

Verður krígsstøða ella onnur vandamikil støða á føroyskum øki, fellur tryggingarveitingin fyri Samlagstryggingina burtur. Føroya Landsstýri tekur í samráð við donsku ríkisstjórnina avgerð um, nær talan er um undantaksstøðu.

Uttanfyri danska ríkið tekur tryggingin ikki við, tá ið limur sjálvboðin tekur lut í kríggi, uppreistri ella líknandi umstøður og tað er atvoldin til tryggingartilburðin.

## § 9. Tryggingargjald.

Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar fyrsta dagin í hvørjum tryggingargjaldstíðarskeiði. Verður ikki goldið rættstundis, fellur ábyrgd tryggingarstovnsins burtur tann seinasta dagin í gjaldsmanaðinum, tó í fyrsta lagi 7 dagar aftaná at endurgjaldskrav er til skjals.

Tryggingargjaldið verður útroknað í mun til tað til eina og hvørja tíð galdandi útrokningargrundarlag sum er góðkent av Føroya Landsstýri.

## § 10. Eigaraviðurskifti.

Samlagstryggingin kann ikki latast øðrum, setast í veð ella á annan hátt umsetast og hevur einki virði, tá hon fer úr gildi.

## § 11. Bonus.

Samlagstryggingin er við í bonusbýtinum hjá LÍV eftir teimum reglum, ið Føroya Landsstýri hevur góðkent.

## § 12. Gjaldsundantøka.

Fer limur úr Samlagstryggingini, áðrenn hann hevur fylt 67 ár, orsakað av sjúku ella vanlukkutilburði, ið er atvoldin til, at arbeiðsføri verður skert til 1/3 ella minni, fær limur gjaldsundantøku og rindar einki tryggingargjald. Tryggingarveitingin við deyða heldur fram, so leingi hann er óarbeibsførður, tó í mesta lagi í 3 ár.

Rætturin til veiting við deyða heldur fram aftaná, at avlamisupphæddin er útgoldin, roknað frá tí degi tað almenna hevur játtað avlamisveiting, sbr. § 3. Sama rætt hevur limur, tá ið hann fær avlamisrentu, soleiðis at rætturin tekur við fra tí degi, avlamisrentan verður útgoldin. Liminum er tryggjað, at hesar veitingar standa við í upp til 3 ár, roknað frá tí degi limurin fór úr Samlagstryggingini.

Tá ið tryggingartakarin er felag ella felagsskapur og limur gerst óarbeiðsførur, sum frammanfyri nevnt, tó uttan at hann er farin úr felagsskapinum, hevur limurin hóast gjaldsundantøku somu rættindi til deyðaendurgjald í upp til 3 ár, í tíðarskeiðnum óarbeiðsførið stendur við aftan á fyrstu 3 mánaðirnar.

Fyri at tryggingin kann fevna um gjaldsundantøku ella at hon kann halda fram, skal limurin skjalprógva óarbeiðsføri sítt, í tann mun LÍV metir tað neyðugt.

Gjaldsundantøka umfatar eisini deyðaendurgjald hjá hjúnafelaga.

Um hjúnafelagin verður óarbeiðsførður, fevnir tryggingin ikki um gjaldsundantøku.

Sáttmálin um Samlagstrygging kann hava í sær treytir um, at gjaldsundantøkan verður longd aftaná nevndu 3 ár, tó ikki longur enn tann dag, sáttmálin fer úr gildi.

### § 13. Framhaldstrygging.

Um ein limur tekur seg úr, uttan at fara í aðra Samlagstrygging, hevur hann/hon rætt til at tekna framhaldstrygging, sum í mesta lagi hevur sama áramál og sama váða, sum var galdandi fyri Samlagstryggingina, uttan at veita nýggjar heilsuupplýsingar.

Framhaldstryggingin umfatar ikki hjúnafelagaveiting, útgjald við óarbeiðsføri og lokaupphædd. Framhaldstrygging gevur heldur ikki rætt til gjaldsundantøku við óarbeibsføri.

Um limur fer upp í aftur Samlagstryggingina, kann LÍV krevja, at framhaldstryggingin verður sett úr gildi.

Um avtalan um Samlagstrygging verður uppsøgd, ber ikki til at tekna framhaldstrygging.

### § 14. Fyrning.

Fyrningarfreistin fyri endurgjald við deyða er 2 ár, roknað við árslok, tá ið tann, ið hevur krav uppá endurgjald, fær at vita um kravið og í seinasta lagi 5 ár aftan á deyða.

Um limur, sum hevur rætt til útgjalding fyri óarbeiðsføri ella endurgjald, tá tryggingartíðin er úti, fer úr Samlagstryggingini, skal kravið um endurgjald koma innan 3 mánaðir eftir at limurin er farin úr Samlagstryggingini.

Somu reglur eru galdandi, tá tað snýr seg um broytingar ella tá Samlagstryggingin verður sett úr gildi.

### § 15. Limur sigur seg úr bólkinum.

Tá ið ein limur fer úr bólkinum, antin tí hann fer úr virksemi/starvi hjá tryggingartakaranum, ella tí hann tekur seg úr tí felagi/felagsskapi, ið er tryggingartakari, ella tí hann ikki longur lýkur treytirar fyri at vera limur í bólkinum, fellur tryggingin burtur tann seinasta dagin í mánaðinum, tá limurin fer úr bólkinum.

### § 16. Uppsøgn.

Samlagstryggingin kann verða uppsøgd til árslok av tryggingartakara og lívstryggingarfelag, við freist uppá 3 mánaðir.

Um so er, at LÍV góðkennir annað grundarlag fyri útrokning av tryggingargjaldinum, og tað førir við sær, at tryggingargjaldið hækkar, hevur tryggingartakarin rætt til at siga upp Samlagstryggingina við eini freist uppá 30 dagar, um uppsøgnin er lívstryggingarfelagnum í hendi innan 30 dagar frá tí degi, tryggingarttakarin fekk at vita, at tryggingargjaldið fór at hækka.